
Eldar Sætre, forstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil hevur havt ein tungan ársfjórðing

**Jógvan Hugo Gardar**

29.10.2015 - 12:59

Oljan.fo

Hannvar eitt sindur speirekandi, forstjórin í Statoil Eldar Sætre, tá hann í gjár legði fram rokniskapin fyri triðja ársfjórðing.

- Tá eg stóð her fyri einum ári síðani var eg júst útnevndur til fyribilsstjóra og oljuprísirnir vóru farnir at lækka. Tey flestu roknaðu nokk við at báðir bara vóru fyribils, men eg eri her enn, og oljuprísurin er framvegis lágur, segði Sætre.

- Eg haldi at vit eru klók um vit fyrireika okkum til at oljuprísurin kemur at halda sær her eina góðatíð afturat.

Rakstrarúrslitið vísti 16,7 milliardir norskar krónur. Tað er lægri enn tað greinarar høvdu mett, og tað er bara helvtina av tí úrslitinum sum Sætre legði fram fyri einum ári síðani.

Fyri teir níggju fyrstu mánaðirnar í 2015, so vísir rokniskapurin nú eitt samlað undirskot uppá 28,2 milliardir norskar krónur.

Eldar Sætre vísti á at fleiri deidlir hjá teimum geva framvegsi góð úrslit, men so eru aðrar sum ikki gera tað. Tann parturin sum millum annað arbeiðir við nýhugsan, oljuframleiðslu (raffinering) og keyp og sølu gevur yvirskot. Hendan ársfjórðingin gav hesin parturin 4,4 milliardir í yvirskoti.

Á hinari síðuni eru tyngri tøk í altjóða virkseminum, har undirskotið er 4,2 milliardir krónur. Fyri einum ári síðani gav hesin parturin eitt yvirskot uppá 3,5 milliardir. Tað er serliga virksemi í Norður-Amerika sum tyngir.

Fyrrverandi fíggjarstjórin í Statoil, Torgrim Reitan, hevur fingið í uppgávu at venda gongdini í USA.